# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Skótalið Sigmunds Brestissonar:

## 80 ára føðingardagur í Skótahøllini

MÓTTØKA
*Myndir: Jens K. Vang*

Hósdagin 2. februar var opið hús í Skótahøllini við Havnará í samband við at Skótafylki Sigmunds Brestissonar fylti 80 ár tann dagin. Tá vóru liðin 80 ár síðan teir fýra havnadreingirnir, Eskild Christiansen, Arne Ellingsgaard, Pauli Christiansen og Zacharias Poulsen, stovnaðu Skótalið Sigmunds Brestissonar tann 2. februar 1926.

Eini trý-fýra ár seinni keypti SSB síni fyrstu høli á Bakkahellu. Í hesum smáu húsunum høvdu skótarnir so skótaarbeiði sítt til í 1956, tá Skótahøllin við Havnará var liðug og gjørdist karmur um skótalívið í SSB.

Nógv fólk stukku inn á gólvið í Skótahøllini hósdagin, bæði núverandi og fyrrverandi skótar. Ein fyrrverandi skóti, Heðin Mortensen býráðsformaður, handaði SSB ein gávukekk upp á 25.000 krónur frá Tórshavnar býráð sum viðurkenning fyri tað arbeiði skótaliðið stendur fyri í høvuðsstaðnum.

Í dag eru umleið 130 skótar í fylkinum. Í nógv ár lá talið um 250, og tá talið var av tí mesta, høvdu meiri enn 300 úlvar, skótar og rovarar sína gongd í Skótahøllina.

Í samband við 80 ár stovningardagin var veitsla í samkomuhøllini í Hoydølum leygardagin 4. februar.



*Hósdagin 2. februar var opið hús í Skótahøllini við Havnará í samband við at Skótafylki Sigmunds Brestissonar fylti 80 ár*



*Ein av ungu skótunum*



*Hildur Arge, fylkisstjóri, og Høgni Jensen, varafylkisstjóri hjá SSB-skótunum*



*Gamlir skótar, f.v.: Jógvan Arge, Andreas Mouritsen, Tryggvi Sondum, Jógvan Ki Jacobsen, Poul Michelsen, Heðin Mortensen, Andreas Lava Olsen, Heri Simonsen og Torbjørn Michelsen*



*Tórbjørn Mikkelsen, Jóannes Rubeksen og Dia Arge*



*Ása Østerø, og Ása og Kári Olsen*